# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**4. sunnudag e. trinitatis**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11 Heri Joensen
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Ann D. Hansen
***Hoyvíkar kirkja:*** kl. 11 Sonja Klein, altargongd, skriftamál kl. 10.40
***Kaldbaks kirkja:*** kl. 12 Bjarni Bæk, altargongd
***Gásadalur:*** kl. 11 altargongd David Johannesen
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, Lisbeth Solmunde Michelsen
***Skála:*** kl. 11 Guðstænasta við altargangi v/ Henning Bøgesvang
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Niels Paui Danielsen altartænastu og altargang og Njál Djurhuus, Frelsunarherurin, prædikar. Talvan gongur fyri heimleys í Føroyum, herbergið hjá Frelsunarherinum
***Vágur:*** kl. 11 Hanus Simonsen
***Hov:*** kl. 12.15 Hanus Simonsen Altarg.
***Øravík:*** kl. 11 Símun Jacobsen
***Fámjin:*** kl. 12.15 Símun Jacobsen
***Sumba:*** kl. 11, dópur + altargongd, Patrick de Neergaard

**Frá Missiónshúsinum við Landavegin**
Møti hóskvøldið kl. 20.00 .
Møti sunnukvøldið kl. 18.00.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Bønarskúlin
Mikudagin kl. 16.30 bøn fyri Ísrael og býnum v.m.
Leygarkvøldið kl. 21 Flare
Sunnudagin kl. 10.45 Morgunmøti. Fríðtór Debes talar, kl. 11.30 Barnagudstænasta
www.filadelfia.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Tensing-kórið venur.
Hósdagin 12. juni kl. 19.30 í KFUK: Fundur við Charlottu Thorsteinson. Evni: Skótahugsjónin.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Mánadag kl. 20.30 Sangvenjing.
Andakt á Ellisheiminum kl. 19.30.
Týsdag kl. 20.00 Hornvenjing.
Mikudag kl. 15 Bønarløta.
Andakt kl. 19 í Vallalíð.
Leygardag kl. 14 Brúðarvígsla.
Sunnudag kl. 18 Møti.
www.frelsunarherurin.fo

**Ebenezer**
Mikudag kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti – Talari: Jens Vang – Evni: Fyrigeving
Hósdag kl. 20 Ungdómsmøti – Talari: Leivur Ragnarsson.
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans ,
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánadag kl. 12.30 Andakt
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Fra Meinigheitshúsinum í Havn**
Mánakvøldið kl. 19 Juniormøti.
Týskvøldið kl. 20 Evniskvøld við Steen Palmqust: evni »eg ynski at mítt barn kennir Jesus«.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/Snorra Brend
Sunnudag kl. 14 Útferð farið verður fra Meinigheitshúsinum kl. 14 við bussum. Havi mat og drekka við sjálvi. Øll eru vælkomin at vera við.
Sunnudag kl 18 Møti v/ Pól Johannesen, sangur John Ellingsgaard.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 familjuog morgunmøti við sunnudagsskúla.
http://www.gospel.fo

**Hebron, Argir**
Mánadagur 9. juni kl. 19: Squash. Bíbliuløta fyri ung 5.-8. flokkur.
Mikudagin kl. 20 Bíbliutími og bønarløta. Evni: Nehemias 1.
Leygardagin kl. 20: Bønarløta: Vit biðja fyri Grønlandi.
Sunnudagur 15. juni: kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30: Samvera við drekka
Kl. 12.00: Sunnudagsskúli
Kl. 12.15: Møti. John Rajani talar.
Hjartaliga vælkomin í Hebron.

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Týsdagin 10. juni kl. 20 Møti við norðmonnum.
www.koma.fo

**Lívdin**
Týskvøldið kl. 20 møti á Brekku, Lív Clementsen tosar um »Bøn - biðja, lurta, hoyra og fáa«.
Leita á okkara heimasíðu, har ber til at hoyra nógvar sangir og talir.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 18 Evangeliskt møti. Onki morgunmøti í summar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagur 11. juni kl. 6 Bøn, kl. 20 Bíbiltími - Áps. 5,17-32. Ápostlarnir verða fongslaðir, v/Boga Olsen.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Rúna Rasmussen
Sunnudagin kl. 17, Møti við Hjørdis H. Petersen. Sangur við Kirstin Olsen.
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Kambsdalur, Handilskúlin**
Týskvøld kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**KFUM & K Klaksvík**
Mikudagin Bíbliutími við Hjørleif Poulsen Nehemia kap. 9.

**Betania, Skopun**
Týsdagin Ungdómurin kemur saman kl. 19.
Mikudagin Bønarmøti kl. 20.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20 bíbliutími Op. 18,13-24.
Sunnudagin kl. 14 fer sunnudagsskúlin útferð. Koyrt verður frá kirkjuni kl. 14. Øll eru hjartaliga vælkomin við. Einki møti um kvøldið.

**Tvøroyri/ Salem**
Møti verður í Salem týskvøldið kl. 20, men um viðrar verð-ur møti úti við Statoil støðina, talarar Svein Petersen og Osvald Kjærbo.
Eisini syngja Finnbjørn, Svein, Kaj o.fl.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hvalba/ Vitnið**
Møti verður í Salinum mikukvøldið kl. 20, men um viðrar verður tað við Gamla Skúla, talari Osvald Kjærbo.
Eisini syngja Svein, Otto o.fl.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11.00 og kl. 18.00.
Bønarmøti mánakvøld kl. 20.00.

**Aglow Suðuroy**
Møti fyri kvinnur og menn verður í Frelsunarherinum í Vági leygardagin 14/6 kl. 15.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gongutúrur niðan á Egilsfjall**
Sunnudagin 15. juni skipar Bygdarfelagið Glæman fyri gongutúri niðan á Egilsfjall. Fari verður frá Glæmuni kl. 14, ferðaleiðari verður við. Væntast at verða aftur í Glæmuni kl. 17, har suppa verður at fáa.
Kostnaður 100 kr. Áhugað kunnu tekna seg á tlf. 211490 millum kl. 17 og 20.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf: 316491/286491 Fax 316481*
*Opið er mánadag til fríggjadag kl. 10.00 – 17.00*
*Teldupostur:tilhald@ torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Túrur til Sands mikudagin 18. juni***
Gongutúrur saman við Tilhaldsfólkunum á Sandi:
Í fótasporum Kálv lítla.
Frásøgufólk: Marius Clementsen.
Døgurði í Húsavík.
Tilmelding: 316491
***Týsdagur***
10.00 – 11.30 Vit syngja - Óli Vang
Øll eru hjartaliga vælkomin
15.00 Opið hús
***Mikudag***
10.00 - 12.00 Bindiklubbur
Øll eru hjartaliga vælkomin
15.00 Túrur: Við bussi niðan Hoyvíkar, ganga oman í Kúrdal

Randi / Elisabeth, fysioterapeutar

FØROYA HANDILSSKÚLI



FØROYA HANDILSSKÚLI

Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tel 317177
Telefax 313374

Heimasíða skúlans:
www.fh.fo

Føroya Handilsskúli søkir eftir

## Lærara at undirvísa í logistikki á akademiútbúgvingini

**Um akademiútbúgvingina logistikkbreytin:**
Akademiútbúgvingin (AÚ) verður boðin sum parttíðarlestur. Útbúgvingin hevur seks modul, ið eru býtt sundur í fýra fakmodul (lærugreinar) og tvær størri verkætlanir.

Í útbúgvingini eru ymsar merkantilar breytir, og sum nakað nýtt er ætlanin at bjóða logistikkbreyt eftir summarfrítíðina.

**AÚ í logistikki fevnir um:**
1) trý kravd fakmodul:
- logistikk
- flutning, distributión og flutningsjura
- altjóða flutning og logistikk

2) eitt valfrítt fakmodul
3) tvær størri verkætlanir:
- sergrein
- endaliga verkætlan

**Um starvið**
Talan er um parttíðarstarv, og vanliga verður undirvíst seinnapart ella um kvøldið. Hvørt fakmodul er 60 undirvísingartímar, býttir út á eina lestrarhálvu. Undirvísing og vegleiðing kunnu í ávísan mun lagast til tíni persónligu ynski.

**Arbeiðsuppgávur:**
- undirvísing í fakmodulunum logistikki og altjóða flutningi og logistikki
- vegleiðing í størri verkætlanum í útbúgvingini

**Vit vænta, at tú:**
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving, ið gevur førleikar at undirvísa í AÚ í logistikki
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta

Undirvísingarroyndir eru ein fyrimunur, men ikki krav.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett 1. september 2008 og verður lønt smb. takstum fyri hægri útbúgvingar á Føroya Handilsskúla.

Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum skulu sendast til Føroya Handilsskúla, Postsmoga 177, FO110 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. juni 2008.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Ainu L. Knudsen, á tel 317177 ella á **alk@hsh.fo.**

*Á Føroya Handilsskúla ganga um 400 næmingar, 200 á hægri handilsskúla (HH) og 200 á fyrisiting, handli og skrivstovu (FHS). Undirvíst verður í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast um 35 lærarar, á Kambsdali um 20. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla og framhaldsútbúgvingum, t.d. teldustøðingi, HD og akademiútbúgving. Akademiútbúgvingin er skipað sum parttíðarlestur.*